TILTØK

Føroyingafelagið í Aalborg
Lille kongens gade 10B,
tlf. 98 13 63 30
email: alaborg@alaborg.dk
Álaborg er opið soleiðis:
Fríggjadag 17-19 og Leygarkvøld 23-03. Álakórið venur mikukvøld kl. 19.30
Annars verða tiltøk hjá felagnum lýst í Túnatos og á heimasíðuni www.alaborg.dk

Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar við at venda sær til Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

Føroyahúsið í Keypmannahavn
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Telefonupplýsing: 33231586
Dagliga telefonin: 33231587
Fax 33231588
E-mail addressa:
postur@faroehouse.dk
Heimasíðan:
www.faroehouse.dk
Á heimasíðuni er skráin, smátiðindi, feløgini og links víða um.
Kaffistovan er opin má.- frí. kl. 14 - 19
Bókasavnið um somu tíð.
Føroyskur døgverðamatur, fløgur, bøkur og pløgg fáast til keyps.
Vilt tú leiga ella skipa fyri tiltaki í húsinum, vendir tú tær til leiðaran.

Føroyingar í Noregi
E-mail:foroyar@norden.no
Heimasíða: http://www.norden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

Føroyingafelagið í Århus
Vestergade 48D
8000 Århus C
Tel. 86 18 06 04
Teldupostur:
aaarstova@hotmail.com
Reglulig tiltøk: Café mánadag-hósdag kl. 16-18.
Barr leygarkvøld kl. 22-03.
MFS kontórtið týsdag kl. 17-18.
Kórvening týskvøld kl. 19.30.
Føroyskur barnaskúli ólika vikur leygardag kl. 11-14.
Sunnudagsskúli líkavikur sunnudag kl. 14.30.
Vit hava eisini fótbólt, flogbólt og badminton. Um hetta hevur tín áhuga kanst tú koma oman í Aarstovu, ella senda okkum ein teldupost og tú fært at vita hvar og nær vit venja. Tú ert altíð vælkomin í hølini hjá okkum, har tú kanst lesa tey føroysku bløðini, fáa ein ókeypis kaffimunn og møta øðrum føroyingum, sum eru í Árhus.

Føroyingafelagið í Svoríki
Vit hava tiltøk nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Annu Westfahl á
tlf. +46176269536 ella Innu Törnroos á
tlf. +468853570.

Føroyingafelagið í Reykjavík
Elin S. Wang, Melabraut 8, 170 Seltjarnarnes, Ísland
Tlf. +354 5522368
E-mail: forrek@visir.is

Eliaskirkjan
Møti er hvørt leygarkvøldið kl. 19 í kjallaranum í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis.
Sunnudagsskúli er í Eliaskirkjuni hvønn sunnudag kl. 14 í kjallaranum og kl. 11 í barnarúminum á Oyrasundskollegiinum, Dalslandsgade 8 á Amager. Øll eru vælkomin.
Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32969995 ella Róa Rasmussen tlf. 32886480.
E-mail: ek_fo@get2net.dk.

Evangeliska Røddin, Odense
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Føroyskt barnamøti
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fællershuset« á C. Vobel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Vika 25 – 18. juni
Vinnaratøl: **14 - 20 - 22 - 24 - 29 - 37**
Eykatøl: **21 - 30**

6 vinnaratøl:	**3.665.492,- kr.**
5 vinnarat.+ eykatal	**84.687,- kr.**
5 vinnaratøl:	**5.046,- kr.**
4 vinnaratøl:	**123,- kr.**
3 vinnaratøl:	**40,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

GJALDOYRAKURSIR

Gjaldoyrakursir ásettir av danska Tjóðbankanum		**18.06.03**	**Ultimo mai 2003**
USA	**Dollarar**	634,5900	628,0200
Bretland	**Pund**	1065,9200	1031,7400
Svøriki	**Króna**	81,8700	81,1400
Noreg	**Króna**	90,7800	94,2400
Sveits	**Frankur**	480,1200	485,9900
Ísland	**Króna**	8,6400	8,7600
Kanada	**Dollari**	472,0600	457,9000
Japan	**Yen**	5,3530	5,2914
	Evra	742,4100	742,4400

FØROYA SPARIKASSI

KROSSORÐ



Vinnari:

Kristianna T. á Ripuni
Undir Heygnum 10
100 Tórshavn

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: SANSALEYST

S	V	Ø	V	N	G	Á	V	U	R		D	A	D	D	A
A	Í	R		A	A	R	A	U		R	A		A	R	K
L	L		F	Í	S		R	U	N	D	Í	N	G	U	R
M	J	Ó	A	N	E	S			U		S	Í		P	A
O	Í	S	E		T	E	R	N	U	R	Y	G	G	U	R
N		Í	R	A		Í	E	N	K	A		E	R		N
E	T	N	O	L	O	G	Í			K	E	R	Í	N	Í
L	Á		E	Í	N	A	S	T	Í		R		M	Í	R
L	Í	A	S		O	R	A	T	O	R	Í	U	M		
A	M	Í		D					D	Ø	K	K	A	R	
341	Y	N	D	Í	S	L	Í	G		K	A		S	E	K
T	R	O	Y	A	B	O	R	G		T		Ý	T	Í	R
R			R			Í		G	L	A	Ð		U	N	O
E	L	Í	N	B	O	R	G		U			Æ			V
N	Æ	L	A		N	E	O	N	L	Y	K	T	Í	N	
A	S	T	R	Í	D		S	T	U	A	R	T		R	A

Hvønn fríggjadag
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn –og viðmerkið »Krossorðagáta nr. .«á bjálvan.

342

Loysunarorðið: .....

Navn: .....

Bústaður: .....

Bygd/býur: .....

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- **Villini súgdjór** - *Dorethe Bloch/Edward Fuglø*
- **Rura** - *Þóra Þóroddsdóttir*
- **Havið** - *Bogi Hansen*
- **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt

FILMSTEIGURIN

2 Fast 2 Furious

Brian O'Connor hevur verið undercover fyrr. Brian O'Conner hevur koyrt streetracing fyrr. men hesaferð koyrir hann fyri lívinum.

Heiðurshugtøkini fyri streetracing-mentanini tóku yvirhond hjá politiagentinum brian O'Connor, sum læt býtið sleppa. Sparkaður út úr politinum livur hann nú í lý náttarinnar myrkursins av júst evnunum handan rattið. Innsatsirnir eru høgir, og eingin megnar útfordringina til tær ólógligu kappingarnar betri enn Brian.

Ti er hann eisini perfektur, tá FBI hevur brúk fyri einum rasarakoyrara uttan respekt fyri ferðslulógini til at infiltrere virksemið hjá Carter Verone. Verone hevur brúk fyri tveimum fúsum hjólum at flyta í longri tíð ppsparda vinningin av narkopengum til hvítvasking. Brian insisterar samstundis upp á at fáa gamla vin sín, Roman Pearse, sum makkara – um ikki annað hava teir báðir brúk fyri at fáa syndaregistarið hjá myndugleikunum reinsað.

Men eitt er at koma innanum í brotsmannaliðið hjá Verone. Eitt heilt annað er at sleppa útaftur. Á lívið… John Singleton traðkar spitaran í botn í hesum pulsadukandi framhaldinum av streetracinghittinum »The Fast and the furious«. Paul Walker er aftur í lutinum sum O'Conner og verður bakkaður upp av Tyrese Gibson sum makkarin Roman. Cole Hauser spælir Verone og Eva Mendes er hansara vakri hjálpari, Monica Fuentes í »2 Fast 2 Furious«.

Star Trek Nemesis

Tíðin er komin til at siga farvæl. Jean-Luc Pciard, kapteinur á U.S.S. Enterprise má siga farvæl til sín næstkommanderandi, Roler. sum nú sjálvur skal hava kommando – og við Deanna Troi, sum hann hevur gift seg við. Men tíðin er eisini komin til at venda sær móti nýggjum avbjóðingum – útfordringum og mótstøðumonnum, sum Picard ongantíð hevði roknað við at møta: Seg sjálvan til dømis!

Tað romulanska tveldi undir einum nýggjum herskari býður til friðarsamráðingar, og Picard er av tilvild í nærindini. Men tað er ikki av tilvild. Skjótt vísir tað seg, at tann romulanski herskarin, Shinzon, er einki minni enn kloning av Picard sjálvum; sett upp at læra »fyrimyndina« at kenna, fúsur til at bíleggja ættarinnar fíggindaskap. Og svíkin nokk til at planleggja bæði at leggja Picard og heimin allan í oyði.

Enn einaferð fer picard kapteinur og manning hansara í leyvunnar gap, har allar tær teknisku landvinningarnar í 24. øld ikki eru nóg mikið til at vinna sigurin, men har mót og snúni kann verða tungan á vágskálini.

»Star Trek Nemesis« er tann fjórði Stra Trek filmurin við »Next Generation-liðnum«, sum vit fyrr hava sæð í sjónvarpi og har aftur Picard Stewart í leiklutinum sum Picard. Sum hansara alter ego, Shinzon, sæst Tom Hardy. Stuart Baird hevur leikstjórnað

Frumsýning
Fríggjadagin 20.06. kl. 19⁰⁰ Fríggjadagin 20.06. kl. 21¹⁵
Fríggjadagin 20.06. kl. 23⁰⁰ Leygardagin 21.06. kl. 19⁰⁰
Leygardagin 21.06. kl. 21¹⁵ Leygardagin 21.06. kl. 23³⁰
Sunnudagin 22.06. kl. 20⁰⁰ Sunnudagin 22.06. kl. 22¹⁵

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu

HAVNAR BIO
P **Tlf. 31 19 56** P
www.bio.fo

Frumsýning
Fríggjadagin 20.06. kl. 20³⁰ Leygardagin 21.06. kl. 20³⁰
Sunnudagin 22.06. kl. 19³⁰

Fríggjadagin 20.06. kl. 23⁰⁰ Leygardagin 21.06. kl. 23⁰⁰
Sunnudagin 22.06. kl. 22⁰⁰

KOMANDI FILMAR



Heimsfrumsýning
Hósdagin 26.06. kl. 20¹⁵

Undanfrumsýning
Hósdagin 26.06. kl. 22³⁰
Prísur 120,- kr.

P **BIO KIOSKIN** P
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.